# Avvarðandi til sálarsjúk sóknast



**Fyri at fáa størri innlit í umstøðurnar hjá avvarðandi hjá sálarsjúkum sóknast Sinnisbati og Psykiatriski Depilin eftir fólki, sum kunnu varpa ljós á evnið**

HEILSA
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Verkætlanin "At síggja við hjartanum" fór av bakkastokki 1. mars. Ein partur av verkætlanini er at gera eina virkisætlan, sum skal lýsa og viðgera støðuna hjá teimum avvarðandi – bæði, hvussu tey kunnu verða ein virkin partur av lívinum og viðgerðini hjá tí sálarsjúka, og um teirra egna tørv á kunning, ráðgeving og øðrum tilboðum.

- Tí vilja vit fegin hava samband við núverandi og fyrrverandi avvarðandi kring alt landið, fyri at hoyra um teirra royndir, hugsanir og ynski, sigur Annlis Bjarkhamar, samskipari.

Virkisætlanin skal millum annað byggja á royndir, hugsanir og ynski hjá teimum avvarðandi og geva boð uppá, hvørji átøk eru neyðug, so avvarðandi eisini fáa eitt gott tilboð í sambandi við sálarsjúku.

Annlis Bjarkhamar sigur, at ætlanin er at hittast við avvarðandi í tíðarskeiðinum 26. apríl – 3. mai, og at tey avvarðandi, sum hava hug at luttaka kunnu senda ein teldupost til sinn@email.fo ella ringja á tlf. 50 76 32 áðrenn 25. apríl. Til ber at lesa meira um verkætlanina á www.sinnisbati.fo.

## Innflutningurin stendur í stað

Fyrstu tveir mánaðarnar í 2008 er innflutt fyri 756 mió. kr. Tað eru 53 mió. minni enn somu mánaðar síðsta ár. Um skip ikki verða tikin við, er ein vøkstur upp á 74 mió. sum er 11 prosent meir enn í fjør, sigur Hagstovan.

Innflutningurin til byggivinnuna og annan ídnað veksur framhaldandi, ávíkavist 25 prosent og 22 prosent. Eisini varð innflutt fyri 34 prosent meiri brennievni. Innflutningurin til beinleiðis húsarhaldsnýtslu er ikki vaksin hesar báðar mánaðarnar, men er á leið tann sami sum seinasta ár.

Innflutningurin av alifóðri er minkaður nógv hesar báðar mánaðirnar. Higartil í ár er innflutt fyri 8 mió. minni enn seinasta ár, tað er ein minking á 69 prosent. Innflutningurin av akførum er minkaður 20 prosent.

**Innflutningur jan-feb 2007 og 2008, mió. kr. og prosent**

| | 2007 | 2008 | Munur | % munur |
|---|---|---|---|---|
| Landbúnaðarvørur og alifóður | 21 | 15 | -6 | -27 |
| - av hesum alifóður | 12 | 4 | -8 | -69 |
| Rávøra til fiskavirking | 20 | 20 | -1 | -3 |
| Tilfar til byggivinnu | 65 | 81 | 16 | 25 |
| Tilfar til annan ídnað | 128 | 156 | 29 | 22 |
| Maskinur og amboð | 76 | 81 | 5 | 6 |
| Brennievni | 121 | 162 | 41 | 34 |
| Akfør | 55 | 44 | -11 | -20 |
| Til beinleiðis húsarhaldsnýtslu | 197 | 197 | 0 | 0 |
| Skip og flogfør | 127 | 1 | -127 | -99 |
| **Samanlagt** | **809** | **756** | **-53** | **-7** |
| **Samanlagt uttan skip og flogfør** | **682** | **755** | **74** | **11** |



Tel 34 10 10 62°N travel faroe islands Faroe Travel FONN FLOG ATLANTIC AIRWAYS atlantic.fo